Løgmaður:

# Torbjørn vísir størstu vanvirðing á Løgtingi

**- Er tað nakar løgtingslimur, ið javnan vísir vanvirðandi atburð og málburð mótvegis løgtinginum og løgtingslimum, so er tað Torbjørn Jacobsen, sigur Løgmaður**

POLITIKKUR
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*

- Eg haldi tað vera sera ódámligt, at Torbjørn Jacobsen nýtir hesa hending at leggja løgmann undir líkt og ólíkt, eitt nú at løgmaður vanvirðir Løgting og fólkaræðisligu skipanina. Eg velji tó ikki at taka hesar ákærur fyri fult, tí er tað nakar løgtingslimur, ið javnan vísir vanvirðandi atburð og málburð mótvegis løgtinginum og løgtingslimum, so er tað Torbjørn Jacobsen, næstformaðurin í Tjóðveldi. Flestu tinglimir hava upplivað og merkt sviðan av rópunum, illsinnisglepsunum, ákærunum og lítið tespiligum persónlýsingunum og vendingunum, sum eru førdar fram av Torbirni Jacobsen av tingsins røðarapalli, sigur Kaj Leo Johannesen, Løgmaður.

Víðari sigur hann.

- Tá ið Torbjørn Jacobsen kennir seg at verða ein síðiligan dómara, yvir millum annað meg sum løgmann, trúgvi eg, at tinglimir eins og eg bert kunnu taka tað í spølni. Torbjørn Jacobsen nýtir Fólkatingið sum fyrimynd har siðvenja er, at ráðharrar altíð møta stundisliga at svara fyrispurningum. Eg kann ikki annað enn at geva honum rætt, at soleiðis eigur tað eisini at verða á Løgtingið. Men Torbjørn Jacobsen gloymir at greiða Føroya fólki frá, at um hann hevði nýtti sama málburð og atburð á Fólkatingi, sum hann nýtir á Løgtingsins røðarapalli, so hevði orðið verði tikið frá honum í stundini, sigur Kaj Leo Johannesen, Løgmaður, í aftursvari til Torbjørn Jacobsen. Løgmaður vísir eisin á, at hann er harmur um, at tað ikki eydnaðist at svara fyrispurninginum áðrenn tingfundurin varð lokin.

## Politikarar kjakast um uppmøting og virðing

Seinastu dagarnar hevur verið ikki sørt av orðaskifti millum politikarar um uppmøting í løgtinginum. Hergeir Nielsen, tingformaður, sleit tveir fundir mikudagin, tí at landsstýrismaður og løgmaður ikki møttu upp til tingfund, har teir skuldu svara fyrispurningum frá tingfólkum.

Serliga harður er orðadrátturin millum Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmann hjá Tjóðveldi og Kaj Leo Johannesen, løgmann, sum vit síggja her á síðuni.

Tórbjørn Jacobsen:

# Løgmaður hevur barnsligar umberingar

**- Í staðin fyri at taka í egnan barm og viðurkenna sítt stóra mistak, so sigur løgmaður seg nú at hava verið á onkrum hissini fundi, sigur Tórbjørn Jacobsen**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í viðmerking í Sosialinum í dag sigur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður Tjóðveldisins, at vanvirðing Kaj Leo Johannesens fyri fólkaræðinum er tiltakandi.

- Ístaðin fyri at taka í egnan barm og viðurkenna sítt stóra mistak, sigur hann seg nú at hava verið á onkrum hissini fundi, sum sambært hansara fatan man hava havt størri týdning enn ein tingfundur, fólkaræðisins evsta bráðpanna, har Føroya løgmaður ætlandi skuldi hava ein aktivan leiklut, hetta tí hann skuldi svara tveimum munnligum fyrispurningum frá Høgna Hoydal, einum frá Karsteni Hansen og einum frá mær sjálvum, sigur løgtingsmaðurin.

Hann vísir á, at eins og hin forsmáddi avvápnaði drongurin í skúlagarðinum slettir hann nú frá sær ófantaligar ákærir eftir formanninum í Tjóðveldi, Høgna Hoydal – at hann ikki vanvirðir tingið við ikki at møta upp til svarið upp á sín egna fyrispurning.

- Táið Høgni Hoydal fór av landinum ígjár, í fólkatingsørindum, avráddu vit báðir, at eg skuldi taka yvir hansara leiklut og spyrja løgmann spurningar hansara. Hesum boðaðu vit løgtingsformanninum frá í góðari tíð. Hetta er vanlig mannagongd og hevur als onki við málið at gera. Tí er vanvirðisliga álopið á Høgna Hoydal eitt somikið bíligt trick, at tað átti ikki at komið einum løgmanni til hugs yvirhøvur, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Tjóðveldistingmeðurin vísir á, at aðrir landsstýrismenn gjørdu sína skyldu á tingfundinum ígjár. M. a. svaraði Jóannes Eidesgaard einum fyrispurningi frá Høgna Hoydal, sum Tórbjørn Jacobsen eisini hevði yvirtikið sambært omanfyrinevndu frágreiðing.

- At landsstýrismaðurin í figgjarmálum í hesum døgum gevur sær stundir at røkja sína fólkaræðisligu uppgávu tænir honum til mikið rós, so mikið álvarsligari er niðrandi attitýdan hjá løgmanni og landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, sum sita eftir við hvør sínum fýra ósvaraðum fyrispurningum eftir tingfundin í gjár, sigur hann.

Sum næstformaður Tjóðveldisins tekur Tórbjørn Jacobsen frástøðu frá álopum løgmans.

- Ja, frástøðu frá niðrandi ákærum og grova álopi hansara á formann floksins, sum als onki hald hava í veruleikanum. Hendan primitiva undanførslan hevur undir ongum umstøðum nakran botn, tí beint eftir spurningarnar frá Høgna Hoydal skuldi løgmaður jú svara Karsteni Hansen og undirritaða, og til tað høvið møtti hann heldur ikki.



Tannlæknastovan í Dalatúni

Í sambandi við at Tróndur Gotfred Joensen, tannlækni, frá 4. januar komandi ár kemur at arbeiða hjá okkum, taka vit nú aftur móti nýggjum patientum.

Tróndur er 33 ára gamal og ættaður úr Havn. Hann hevur arbeitt sum tannlækni í Keypmannahavn í sjey ár, samstundis sum hann hevur undirvíst á Tannlæknaháskúlanum.

Umframt vanligt tannlæknaarbeiði er Tróndur serkønur í implantatviðgerð og kirurgi.

TANNLÆKNASTOVAN Í DALATÚNI 19 · Tlf. 31 51 58

MARNAR GAARD · ÍSAK THOMASSEN
REGIN EIKHÓLM · EYÐBJØRN GAARD

